# 100 bátar á festival

**Tá fólk í Nes kommunu á fyrsta sinni skipaðu fyri bátafestivali á Toftum, var bátatalið umleið 40. Seinnu árini eru fleiri og fleiri bátar komnir við, og í fjør lá talið um 85. – Høvdu stívliga 100 bátar komið við leygardagin, høvdu vit verið sera væl nøgd, sigur Høgni W. Høgnesen, formaður í Bátafelagnum**

Vilmund Jacobsen

Á Toftum eru fyrireikingarnar til sætta bátafestivalin í røðini nú av álvara í gongd, og í annaðkvøld verður stóra tjaldið, sum felagið eigur, sett upp á festivaløkinum.

Høgni W. Høgnesen, formaður í Bátafelagnum, sigur, at tjaldið, sum felagið keypti fyri fáum árum síðan, upprunaliga var 30 metrar langt og 12 metrar breitt, men nú hevur felagið keypt 6 metrar uppí tjaldið aftrat.

– Vit hildu, at tjaldið saktans kundi verið størri, eitt nú til stóra dansin, og nú hava vit so bygt tað út, sum hann tekur til.

Formaðurin í Bátafelagnum sigur, at tað krevur nakað av fólki at seta tjaldið upp, men við góðari manning tekur sjálv uppsetingin neyvan meiri enn einar tveir tímar.

– Haraftrat kemur so gólvið. Her læna vit plattar, sum verða lagdir eftir øllum gólvinum, og omanyvir plattarnar leggja vit byggiplátur, sum verða skrúvaðar niður í plattarnar. Felagið eigur byggipláturnar, sum eru kubbaðar til og verða goymdar millum stevnurnar, so tær kunnu brúkast ár um ár, sigur hann.



FORMAÐURIN *– Øll eru vælkomin, og vit gleða okkum til at vera vertir á hesi fyrstu bátastevnuni í ár, sigur Høgni W. Høgnesen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Góður stuðul

Høgni W. Høgnesen sigur, at tað hevur gingið væl undanfarin ár at fáa tjaldið upp at standa, og fólk eru óført at hjálpa til.

– Hetta er triðja árið á rað, at vit hava egið tjald til fleiri av okkara tiltøkum. Vit eiga eisini eitt minni tjald, og haraftrat hava vit lænt tvey smærri tjøld úr Runavík, leggur hann aftrat.

Formaðurin í Bátafelagnum er takksamur fyri, at bæði einstaklingar, samkomur og feløg í kommununi hava sagt seg vera til reiðar at taka hond í við ymisku tiltøkunum, eitt nú við at servera og til at skipa fyri, har eitt nú hoppiborgirnar eru.

### Økt bátatal

Høgni W. Høgnesen sigur, at tá felagið á fyrsta sinni skipaði fyri bátafestivali, var talið av bátum umleið 40.

– Síðan eru fleiri og fleiri bátar komnir við so hvørt, sum árini eru liðin, og í fjør vóru einir 85 bátar við í siglingini úr Skálafirði og út á Toftir.

Hann fegnast um, at festivalurin soleiðis hevur fingið størri og størri undirtøku og heldur, at hevði talið av bátum á festivalinum leygardagin farið um teir 100, hevði hetta verið so óført.

Høgni sigur, at umstøðurnar í Oyrahavnini eru rímiliga góðar, og her liggja bátarnir tryggir, tó at tað kann gerast eitt sindur trongligt – alt eftir, hvussu stórt bátatalið verður.

– Bátarnir hava møguleikan at fáa landstreym og vatn, og tað verður havnarmeistarin, Hans Óli Viberg, sum kemur at skipa fyri, hvussu bátarnir skulu liggja, leggur hann aftrat.

### Stjórar á tekning

Eitt afturvendandi og umtókt tiltak á bátafestivalinum á Toftum er ein sonevnd meksikansk uppboðssøla, har ein tekning verður seld. Tekningin plagar at ímynda kendar persónar í Nes kommunu.

Høgni W. Høgnesen vil í dag avdúka, at tekningin hesaferð er av nøkrum kendum stjórum í kommununi, og tað er Eyðun Dahl Christiansen, sum hevur teknað.

– Tað verða brøðurnir, Kári og Tórður Mikkelsen, sum koma at standa fyri uppboðssøluni í ár, sigur hann.

Spurdur, hvussu nógv meksikanska uppboðssølan plagar at geva í peningi, sigur formaðurin í Bátafelagnum, at ágóðin hevur verið ymiskur, men alt millum 10.000 og einar 20.000 krónur.

– Øll eru vælkomin á bátafestivalin leygardagin, og vit gleða okkum til at vera vertir á hesi fyrstu bátastevnuni í ár, sigur Høgni W. Høgnesen.

vilmund@sosialurin.fo

**Fakta**

**Bátafelagið á Toftum er stovnað 13. mars í 2005.**
**Í nevndini eru: Høgni W. Høgnesen, formaður, Krisolvur Johannesen, næstformaður, Høgni Hansen, kassameistari, Snorri Jensen, ognarrøkil og Haldur Gaardbo, skrivari.**
**Tiltakslimir eru: Hans Óli Viberg og Borgar Hansen.**

# Felagshúsið verður pakkað upp og niðuraftur

**FELAGSHÚS Bátafelagið á Toftum hevur ein dreym um eitt felagshús, men enn liggja hesar ætlanir helst nakað frammi í tíðini**

Vilmund Jacobsen

Høgni W. Høgnesen, formaður í Bátafelagnum á Toftum, sigur, at felagið hevur havt ætlanir um at byggja eini felagshús, og í hesum sambandi hava tey havt fyrispurning hjá Nes kommunu um grundøki.

– Jú, vit hava ein dreym um at fáa tak yvir høvdið, men vit hava ikki fingið at vitað, hvørjar ætlanir kommunan hevur kring um havnalagið.

Høgni W. Høgnesen ásannar, at byggiætlaninar helst liggja nakað frammi, tí enn hevur felagið ongar tekningar av einum slíkum húsi. Hann dugir tí heldur ikki ítøkiliga at siga, hvussu felagið hugsar sær, at ein slík byggiætlan kemur at síggja út.

– Vit hava reist fyrispurningin hjá kommununi, har vit hava søkt um grundøki. Tey hava neyvan gjørt meiri við málið, og tað hava vit heldur ikki, sigur hann.

Formaðurin í Bátafelagnum ásannar, at felagshølini hjá teimum er stóra tjaldið, sum tey eiga, og sum nú verður brúkt á hvørjum festivali.

– Vit kunnu siga, at okkara felagshús verður pakkað upp, tá bátafestivalur er og verður síðan pakkað niðuraftur, tá tiltakið er liðugt, sigur Høgni W. Høgnesen.

vilmund@sosialurin.fo